## Alonso stýrdi miðvøllinum

Venjingarlegan hjá Real Madrid í USA heldur áfram, og sunnudagin spældi venjingardyst í móti DC United. Í hesum dysti var tað Xabi Alonso, sum stýrdi miðvøllinum fyrsta góða tíman av dystinum, áðrenn hann varð skiftur út. Málunum tók ein landsmaðurin hansara av, tí áleyparin Higuain gjørdi tvey mál. Tað triðja málið gjørdi Robben, sum eisini skoraði, tá Real Madrid spældi í móti Toronto fríggjakvøldið.




## Real Madrid stórsigur í venjingardysti

Ikki færri enn fýra debutantar vóru millum leikararnar, tá Real Madrid vann 5-1 á Toronto fríggjakvøldið. Kaká, Xabi Alonso, Alvaro Arbeloa og Raul Bravo vóru allir á vøllinum í stórsigrinum, tá uttan at teljast millum málskjúttarnar. Raul við tveimum málum og so ein annar nógv umrøddur leikari, Ronaldo, syrgdu fyri, at hálvleiksstøðan var 3-0. Eftir steðgin skoraði eisini ein nýggjur leikari, tá Benzema fekk bóltin í netið. Arjen Robben var seinasti leikarin, sum skoraði fyri Real Madrid.

## B36 – Víkingur 1-3 (1-2):

# Nú sansar at hjá B36

B36

Víkingur

**B36 tapti aftur og er nú undir trýsti í niðurflytingarstríðnum. Finnur Justinussen fekk tvey mál leygardagin og er nú greiður toppskjútti í Vodafonedeildini**

FÓTBÓLTUR
*Uni Holm Johannesen*
*uni@sosialurin.fo*



Eftir eina frálíka byrjan, hevur B36 bara vunnið eina ferð síðan 19. apríl. Tað var í 11. umfari á heimavølli móti 07 Vestur
Mynd: Hilmar Jan Hansen/Einslistir

B36 er nú av álvara partur av niðurflytingarstríðnum. Leygardagin noyddust hvítklæddu havnarmenninir aftur av vøllinum uttan stig. Triðju ferð upp í slag tapti høvuðsstaðarfelagið, og tað eru í løtuni lítið sum bendir á, at støðan verður betri í bræði.

### Eingin stuðul

Festivalur var í Klaksvík um vikuskiftið. Tað er helst ein orsøk til, at fáir B36-fjepparar vóru til dyst leygardagin. Men tað er neyvan øll frágreiðingin.

Stuðulin til liðið er ikki serliga stórur í hesum døgum. Nógv meira enn helmingurin av sitiplássunum í B36-húsinum vóru ikki nýtt til leygardagin. Tað var sjáldan, at áskoðararnir eggjaðu sínum leikarum við herðaklappum og øðrum. Tað er víst, at felagið er í óvandari støðu.

Aftur um vikuskiftið kundi B36 við eitt sindur av hepni og neyvleika fingið stig. Men soleiðis er hvørjaferð. Hóast liðið er við í dystinum leikliga, sæst tað ikki á stigatalvuni.

### Venjarin

Fjeppararnir fegnaðust, tá tað var kunngjørt, at Mikkjal K. Thomassen hevði tikið á seg uppgávuna at standa á odda fyri besta mansliðnum hjá B36 í 2009. Fyrrverandi miðvallarkempan er høgt í metum millum áskoðararnar, og tí varð vónað, at hann fór at standa seg væl. Tað hevur hann ikki higartil.

Thomassen hevur ikki havt lættar umstøður. Fleiri yngru leikarar royna seg á fyrsta sinni í bestu deildini, og skaðar hava givið honum trupulleikar. Men leikaratilfarið er betri enn at stríðast um niðurflyting. Við Brima Koroma, Odmari Færø, Jákupi á Borg, Klæminti Matras, Herberti í Lon Jacobsen og Dennis Holmberg á liðnum eigur B36 at vera í miðbólkinum á stigatalvuni. Men eftir eina frálíka byrjan, hevur B36 bara vunnið eina ferð síðan 19. apríl. Tað var í 11. umfari á heimavølli móti 07 Vestur.

Venjarin er kroystur. Spurningurin er, hvussu tryggur hann situr í venjarasessinum nú. Hann skal syrgja fyri, at liðið er til reiðar at bjóða av í gullstríðnum í 2010. Men í løtuni ræður fyrst og fremst um at varðveita sætið í deildini.

Men tað er ikki verri enn so, at trý stig næstuferð kann geva liðnum luft aftur.

### Fann aftur málið

Finnur Justinussen finnur altíð málið. Tað gjørdi hann aftur leygardagin. Í tveimum reisum.

19 ára gamli Justinussen er í løtuni toppskjútti í Vodafonedeildini. Hann roynir seg í bestu deildini á fyrsta sinni, og framherjin hevur av álvara gjørt vart við seg.

Hann luttekur ikki serliga nógv í framrættaða spælinum. Soleiðis var heldur ikki leygardagin, tá hann sjáldan bjóðaði av og setti mótstøðuverjuna undir trýst. Men hann er altíð á rætta staðnum. Og tað er ein eginleiki, sum tey eru sera fegin um í Víkingi.

### Málini:

**0-1:** Gestirnir hava lætt spæl í høgru, tá bólturin brádliga endaði fyri føturnar á Zoltán Bukszegi, sum var tryggur.
**1-1:** Jákup á Borg finnur hegnisliga Berg Midjord, sum hevur funnið sær pláss í brotsteiginum. Midjord er knappur og smekkar til. Umvegis tvørtræið javnar hann fyri B36.
**1-2:** Bólturin støkkur upp í loft inni í brotsteiginum. B36-verjuleikararnir meta, at bólturin fór av vøllinum, tá leðurkúlan brádliga dalar beint niður til Finn Justinussen. Tætt frá málinum setur framherjin høvdið á.
**1-3:** Víkingur fer í skjótálop, tá Tróndur Vatnhamar brádliga stendur í ongamannalandi millum málið og bóltin. Finnur Justinussen hevur bæði tíð og pláss, áðrenn hann sendir framvið málverjanum.

## Botnstríðið er gevandi

- Ja, sjálvsagt eru vit vónbrotnir.

Jákup á Borg og B36 eru í óvandari støðu í hesum døgum. Tað er fyrstu ferð, at landsliðsleikarin hevur tikið lut í niðurflytingarstríðnum.

- Tað er løgið. Men eg vil siga, at tað somuleiðis er gevandi. Vit vistu undan kappingarárinum, at tað fór at verða trupult. Vit læra í løtuni, hvussu vit skulu takkla ógvusliga mótgongd. Og tað er serliga gevandi, um eg einaferð verði venjari. Men vit vóna og vænta, at tað fer at venda, sigur Jákup á Borg.

Hvat tosa tit um í hálvleikinum, tá tit eru aftanfyri 2-1?

- Vit ætlaðu at leggja meira fyri í framrættaða spælinum, men megna ongantíð at leggja Víking undir trýst. Vit tosa ikki við stórum orðum í hesum døgum. Vit stríðast framvegis og tað fer at bragda hjá okkum fyrr ella seinni, sigur landsliðsleikarin, sum var bilsin um, at tað ikki vóru fleiri fólk og stuðlaðu liðnum leygardagin. Men hann leggur dent á, at liðið fegnast um tey, sum stuðlaðu.

**- uni**

## Als ikki undirhaldandi

- Eg segði við Niclas Niclasen undir dystinum, at eg var glaður fyri, at eg ikki hevði goldið 100 krónur fyri at sæð hendan dystin.

Soleiðis sigur Atli Gregersen, verjuleikari hjá Víkingi, sum sjálvsagt var fegin um stigini, sum liðið vann í Gundadali leygardagin.

- Odmar Færø spældi bóltin til Róald Jacobsen, og síðan fekk Odmar Færø hann aftur. Ímeðan stóðu vit og hugdu. Soleiðis var tað í stórum løtum. Men vit hava fult tamarhald á og sigurin var uppiborin. B36 er ein "sleeping giant", sum onglendingar siga, og vit høvdu væntað okkum ein torføran dyst. Tað royndu teir eisini, men vit stóðu ímóti, sigur Atli Gregersen, sum er fegin um mongu rennitúrarnar við venjaranum í vetur.

- Jógvan Martin Olsen legði stóran dent á kropsligu venjingina í vetur. Tað kemur okkum av álvara til góðar nú, tá vit hava fleiri dystir eftir fáum døgum, sigur Atli Gregersen.

**- uni**